TK Stovan



## Kunningarfundir um virksemið hjá TK Stovuni

verða kring landið á hesum støðum:

Mánakvøldið 21. januar á Hotel Vágum í Sørvági
Týskvøldið 22. januar á Hotel Føroyum í Havn
Mikukvøldið 23. januar í ungmannafelagshúsinum Virkinum á Sandi
Hóskvøldið 24. januar í gamla Pakkhúsi í Vági
- allir fundirnir verða frá klokkan 19.00 til klokkan uml. 21.00



**Skrá**

1. Alment um TK Stovuna
   - hvat kann TK Stovan bjóða vinnuni, íverksetarum, uppfinnarum o.ø.
   - kann TK Stovan hjálpa tær?
2. Ognarviðurskifti og ábyrgdir við ymiskum virkisformum: Firma, P/f og Sp/f - fyri íverksetarar og uppfinnarar
3. Hvussu kann eg meta mítt virki og samanbera tað við onnur virkir (Benchmarking)
4. Umboð frá lokalu deildini hjá Toll og Skatt greiða frá, hvørji rættindi og hvørjar skyldur virkir hava yvirfyri skattamyndugleikunum
5. Ymiskt
   - møguleiki er at seta viðkomandi spurningar

Ynskiligt er at boðað verður frá luttøku á tlf. 31 73 66



TK Stovan
Niels Finsensgøta 37, FO-100 Tórshavn
Tel +298 317366, Fax +298 319363
tk@tk.fo www.tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR
TK Stovan er ein liður í menningini av føroyska vinnulívinum og samstundis ein partur av tí víðfevnda danska TIC-kunningarsamstarvinum.

---

FISKISKIRANNSÓKNARSTOVAN

## Prøvatakari m/k í Suðuroy

Fiskirannsóknarstovan sóknast eftir einum fólki at taka prøvar av fiskalandingum í Suðuroy.

Arbeiðið krevur nærlagni og áhuga og eina hampuliga góða heilsu, men annars ikki nakrar serligar fortreytir.

Arbeiðið umfatar longdarmáting og viging av fiski, ið verður landaður til uppboðssølu og/ella fiskavirkini, umframt at nytrar skulu takast og hartil hoyrandi skriviarbeiði. Hetta arbeiði er ein liður í stovnsmetingararbeiðinum hjá Fiskirannsóknarstovuni.

Arbeiðstíðin lagar seg eftir, nær skip og bátar landa og er sostatt ikki fulltíðarstarv. Umsøkjarin má vera til reiðar at arbeiða ymsar tíðir á degnum.

Umsóknarfreistin er úti 1. februar 2002.

**Fiskirannsóknarstovan**
Nóatún 1
Postsmoga 3051
110 Tórshavn

---

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

## Læknaskrivari til Oyrna/næsa og hálsdeildina

Fast hálvtíðarstarv sum læknaskrivari á **ONHdeildini** er leyst at søkja til setan frá 1. mars 2002 ella eftir avtalu.

Førleikakrøv:
- útbúgving sum læknaskrivari
- tænastusinni
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni
- góður røkjuskapur

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Petur Ellefsen, yvirlækna, telefon 313540, lokal 269.

Skivligar umsóknir við avriti av prógvum og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 4. februar 2002 kl. 12.00.

---

# Leygardag
## kl 14.00 - 17.00

kaffi ella the

&

súreplaterta ella kirsjuberjaterta

&

rómi ella súrrómi

**KR. 30,-**

livandi tónleikur

CAFÉ NATÚR
Tlf. 31 26 25

---

RK

**BÓKHALDSSTOVAN**
hjá Regin Klargaard
FO-176 Velbastaður

MvG uppgerð - roknskap v.m.

*tlf 32 81 96*
*fart. 218196*

---

## Solar Føroyar

Vit sóknast eftir fryntligum og fyrikomandi fólki til goymslu okkara.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at senda eina umsókn ella ringja til:

**Solar Føroyar**
Brekkutún 2 · Hoyvík
Tlf. 357933 fax. 317890
t-post: finn@solar.fo

---

Premier Nestlé

## Sølufólk til ísbilin

Vit sóknast eftir fryntligum og fyrikomandi sølufólki til ísbil okkara. Tú kemur at gera uppsøkjandi søluarbeiði kring oyggjarnar og annars at hava ábyrgdina av allari goymslu og levering av ísi.

Tú mást duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava stóra koyrikortið.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so send okkum eina umsókn.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at ringja og tosa við Heina á telefon 31 11 61.

PH
Heykavegur · tel 31 11 61 · fax 31 53 61

---

**Sjúkrasystraskúli Føroya**
Fo 100 Tórshavn

## Sjúkrasystralærari

Eitt starv sum sjúkrasystralærari verður leyst til setan frá 1. mars 2002 fyribils í eitt ár.

**Høvuðsuppgávurnar hjá læraranum fevna um:**
- Undirvísing í sjúkrarøkt
- Saman við undirvísarunum á skúlanum leggja frálæruna til rættis
- Arbeitt verður í stóran mun í toymi

**Førleikakrøv:**
- Sjúkrasystir við viðkomandi framhaldslestri á kandidat ella masterstøði
- Kunnleika til sjúkrasystraútbúgvingina og royndir innan undirvísing
- Sjúkrasystir, sum er í gongd við hægri lestur, kann eisini søkja.

Sjúkrasystraskúli Føroya tekur 20 lesandi inn um árið.

Á skúlanum verður støðugt arbeitt við at menna sjúkrasystraútbúgvingina. Í sambandi við at sjúkrasystraútbúgvingin verður umløgd, henda stórar broytingar á skúlanum. Sum lærari á skúlanum fært tú møguleika at luttaka í og ávirka broytingarnar.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Sjúkrasystrafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Bergliot Ihlen, rektara, á tlf. 316027 lokal 436.

Umsókn við CV og prógvum skal sendast til:

**Sjúkrasystraskúla Føroya**
Att.: Rektaran
Eirargarður 14 B
FO-100 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 4. februar 2002.

---

www.sosialurin.fo

---




---

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

## Les lívfrøði, evnafrøði og innføring í kolvetni á Náttúruvísindadeildini várið 2002

Mánadagin 4. februar 2002 byrjar ein nýggj lestrarhálva á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum.

Í lívfrøði/evnafrøði verða hesi fak:
- Eiturvistfrøði og dálking
- Evnafrøði
- Hagfrøði fyri lívfrøðingar
- Ryggdýr
- Plantuskipan
- Almenn vistfrøði

Í kolvetnisverkfrøði:
- Innføring í kolvetni

Skeiðið um eiturvistfrøði og dálking er skipað soleiðis, at øll undirvísingin er í februar mánað. Undirvíst verður hvønn dag frá 10.15 til 12.00. Skeiðið um Almenna vistfrøði er 2 vikur: 8.-12. apríl og 13. - 17. mai.

Fólk uttanífrá kunnu melda seg til eitt ella fleiri av skeiðunum.

Meira fæst at vita við at hyggja á heimasíðuna: www.sleipnir.fo/setur/nvd/nvd75.htm. Her eru tímatalvur, lýsingar av skeiðunum og hvørjar fortreytir krevjast til tey ymisku fakini. Áhugað kunnu venda sær til Náttúruvísindadeildina tel. 31 53 06.